# Trailari út av við 26 tonsum av alifóðuri

**Hendingin fór fram á smala vegastrekkinum millum Skálafjørð og Skála, og tað tók einar 5 tímar, áðrenn fóðurið var fingið av vegnum, og trailarin var komin uppaftur á rættkjøl**

FERÐSLUÓHAPP

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánakvøldið um 20-tíðina fór ein trailari hjá Hera Thomsen út av smala vegnum millum Skálafjørð og Skála. Trailarin, sum koppaði oman av, var lastaður við 26 tonsum av alifóðuri.

Løgreglan í Runavík sigur, at trailarin helst er komin ov langt út á vegøkslina, tá ið førarin møtti einum mótkoyrandi bili á smala vegnum beint eftir grótbrotið, sum er har á leiðini. Tað vísti seg nevniliga, at vegjaðarin var skrædnaður undan. Trailarin koppaði og var liggjandi á aðrari síðuni.

Hálka var ikki orsøkin til óhappið.

Hóast hendingin fór fram um 20-tíðina, tók tað fleiri tímar, áðrenn fóðurið var fingið av vegnum, og trailarin var komin uppaftur á rættkjøl.

Løgreglan sigur, at tað var ikki fyrr enn um 01-tíðina, at alt var yvirstaðið, og vegurin kundi latast uppaftur fyri regluligari ferðslu.

Sum skilst, sluppu bilar ígjøgnum í løtum, men undir sjálvari upptøkuni varð neyðugt at steingja vegin fyri allari ferðslu.

Løgreglan sigur, at ein krani hjá Mekanik í Runavík varð nýttur til sjálva upptøkuna.

– Tað gekk eitt sindur striltið, tí anhangarin bleiv hangandi uppi í trailaranum, men umsíðir eydnaðist at fáa bæði trailaran og anhangaran uppá rættkjøl.

Løgreglan sigur, at ein maður var í trailaranum, tá ið óhappið hendi, men hann slapp væl frá hendingini.


## Politistur

### Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur verða hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet - ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðing fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

### Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum.

Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum - um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí.

Atlitið til borgaran og samfelagið er alla tíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar

### Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum.

Royndartíðin er umleið 3 ár. Aftaná tað fært tú - um tú ert egnaður til politiarbeiði - fast starv sum politistur.

### Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politið hevur eina røð av serskeiðum - og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



### Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði - og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

**Føroya Landfúti**
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Postsmoga 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 1448 fax. 35 1449
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 3 politistar skulu setast heystið 2004.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 15.03.2004



## Hús til leigu

Vegna eitt av starvsfólkum okkara við familju søkja vit eftir einum húsi í Tórshavn at leiga frá 1. april 2004.

Húsini skula vera í minsta lagi 120 m², í góðum standi og klár at flyta inn í.

Hava tygum eini hús til endamálið, eru tygum vælkomin at ringja til SMS, tel 313041 og spyrja eftir Niels Mortensen.

ISS Føroyar

Postboks 1059 • 110 Tórshavn • Tel 313041 • Fax 317434





**BYLGJAN**
*bíliga til sølu*
(uttan fiskiloyvi)

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorur: | | Caterpillar 65,4T(1993) | |
| Megi: | 210 HK | Mesta ferð: | 11 míl |

Øll vanlig nautisk útgerð. 24 volt ravmagn og línuspæl. Eyka aluminiumsbrúgv fylgir við. Báturin er í fiskiklárum standi.

**Væl egnaður goggubátur ella frítíðarbátur!**

SISERO 351800

www.batasolan.com

Søla, keyp og umbýti av nýggjum og brúktum fiski-, ali- og frítíðarbátum
**... vit eru hollir í bátaráðum!**

BÁTASØLAN

v/ Sámal J. Joensen
Sundsvegur 11 • FO-100 Tórshavn
tel 32 16 66 • fax 32 17 66 • far 21 38 00
info@batasolan.com • www.batasolan.com




# Missiónsvika



Valentinesdagurin verður aftur í ár hildin á ein serligan hátt á matstovuni á Hotel Hafnia

**Missiónsvika verður í kirkju- & missiónshúsinum á Argjum 9.-15. februar**

MISSIÓNSVIKA

*Andreas Dalsgaard*
*andreasbacon@hotmail.com*

Sera nógv áhugavert verður á skránni í missiónsvikuni. Møtir verða hvørt kvøld við ymsum talarum kl. 20:00 og sunnudag kl. 14:00 og kl. 18:00. Og nógv framúr kór skulu framføra.

Møtini vera við millum annað: Tom Skaale, Reimund Langgaard, Jóna Thomsen, Niels Jacob Nielsen og John Myllhamar.

Kórini, sum fara at framføra verða millum annað KFUM&K kórið í Klaksvík, Meinigheitskórið, Gratia, Argjakórið, Barnakórið og Beinta og Ingi. Bønarløta verður eisini hvørt kvøld og høvi verður at fáa sær ein drekkamunn.

Og til tey sum hava børn, verður barnaansing fríggja-, leygar- og sunnukvøldið.

Harafturat verður eisini eitt bóka og fløguborð. So lagt er upp til eina spennandi og góða missiónsviku á Argjum.

# Romantikkur á Hafnia

**Føroyingar fáa aftur í ár møguleikan at njóta tann vælumtókta »Valentines-dagin« á Hotel Hafnia**

VALENTINES-DAGUR

*Andreas Dalsgaard*
*andreasbacon@hotmail.com*

»Valentines-dagurin« hevur í mong ár verið hildin í USA og aðrastaðni í útheiminum Seinastu árini er hann vorðin alt meiri vanligur í grannalondum okkara, og nú eisini í Føroyum.

14. februar er dagurin tá romantikkurin verður settur í hásæti, og fyri at fullkoma »idyllin«, gera vit eitt høvi har tit saman kunnu njóta eina »lekra« matskrá og livandi tónleik. Góða røddin hjá Ronni Poulsen saman við bleytum guitartónum hoyrast á hotellinum í miðbýnum leygarkvøldið.

Fríggjakvøldið 13. februar & Valentineskvøldið 14. februar frá kl. 18:00 og aftur frá kl. 20:45 ber til at hugna sær saman við tí einasta eina á matstovuni á Hotel Hafnia.



Valentinesdagurin verður aftur í ár hildin á ein serligan hátt á matstovuni á Hotel Hafnia

# Grót konsert í Losjuni í Gøtu



*48 Pages áðrenn teir fingu nýggjan ham*

**Eftir at hava ligði í dvala eitt tíðarskeið vegna Løgtingsval, fer Grót nú aftur undir sítt regluliga virksemi**

KONSERT

*Andreas Dalsgaard*
*andreasbacon@hotmail.com*

Lagt verður út við at hava eina konsert nú komandi leygardag 14. februar.

Konsertin verður í Losjuni í Gøtu og bólkarnir sum fara at spæla eru:

Frostbit, Speaker og 48 Pages.

Frostbit er mannað av: Eirik Mikkelsen guitar, Martin í Grund guitar, Johannes Tausen trummur, og Tommy Hansen bass, og hava teir verið róptir at spæla »Fushion rock« ella »Experimental rock«.

Speaker eru fýra mans í tali og eita teir: Bogi Berg guitar, Sigurd Justinussen trummur, Jan Jensen bass, og Janus Rasmussen á sang og guitar. Og teir spæla »Sveimandi alternativan rock«.

48 Pages er manning úr bólkinum Monkey Mongulia, sum nú koyrir undir nýggjum navni. Teir ið manna hendan bólk er: Eyðun Müller Thomsen trummur, Bartal Læarsson bass, Frans Jónas Arge Galán guitar og sang og Bjartur Dal Christiansen guitar. Og teir siga seg spæla »Friðarligan-Harðan-Sírutan-Rock«.

Byrjað verður kl. 21:00 og kostnaður er 60 krónur fyri limir, og 80 krónur fyri tey sum ikki eru limir.